## Øll tey stóru uttan Ongland

Nú er greitt, hvørji sekstan vera við í lutakastinum til EM endaspælið, sum verður annan sunnudag Eftir at tað hevur verið kappast síðani í september 2006, er tað nú greitt, hvørjar sekstan fótbóltstjóðir vera við í hattinum, tá ið tað annan sunnudag verður kastað lut um, hvussu europeisku fótbóltstjóðirnar skulu bólkast í endaspælinum, sum verður í Sveis og Eysturríki í juni næsta ár. Tær stóru europeisku fótbóltstjóðirnar hava allar spælt seg í endaspælið við einum undantaki. Undantakið er Ongland, sum kiksaði á Wembley í kvøld. At Ongland ikki megnaði at spæla seg í endaspælið ber við sær, at eingin av bretsku fótbóltstjóðunum (Ongland, Skotland, Wales, Norðurírland og Írland) vera við í endaspælinum. Tey sekstan, sum hava spælt seg í endaspælið, eru: Sveis, Eysturríki (vertir) Pólland og Portugal (A) Italia og Frakland (B) Grikkaland og Turkaland (C) Tjekkia og Týskland (D) Kroatia og Russland (E) Spania og Svøríki (F) Rumenia og Holland (G). Endaspælið verður í Sveis og Eysturríki frá 7. og til 29. juni.

**Enski landsliðsvenjarin Steve McClaren, fekk í morgun sekkin frá enska fótbóltssambandinum**

# Nú eru bakkarnir her

**Saman við Einari Hansen tykist Johan Troest Davidsen upp á stutta tíð at hava bitið seg fastan í byrjunaruppstillingina á føroyska landsliðnum. Sjálvur hevði hann als ikki væntað, at menningin skuldi ganga somikið skjótt**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk/*
*Álvur Haraldsen*
*jakup@sosialurin.fo*




*Talan vildi verið um mest sum perfekta dagin, hevði Johan sent á stólpan og inn, heldur enn út. Men ungi NSÍ-spælararnir hevur nú einki at skammast um, hóast hann iðraði seg í løtuni eftir stútaran*

**Modena, Italia:** Fyri bara góðum tveimum mánaðum síðani var Johan Troest Davidsen partur av føroyska U21-landsliðnum, sum hevði truplan útidyst móti Italia.

Síðani hevur tó gingið skjótt, og mikukvøldið kundi hann spæla sín næsta A-landsdyst. Aftur hesa ferð í Italia, har mótstøðan var móti heimsmeistarunum. Eitt lop, sum Johan sjálvur ikki hevði droymt um fyri bara fáum mánaðum síðani.

- Tað var ikki í mínum tonkum tá, at tað skuldi ganga so skjótt. Men tað er ótrúliga stuttligt. Tá tú fylgir við í fótbólti, so kennir tú øll hesi stóru nøvnini, sum teir hava á liðnum, so hetta er ein ótrúliga spennandi avbjóðing.

Men tað er kanska bara at fara óimponeraður til verka, hóast nøvnini eru stór?

- Ja, men eg vil tó siga, at tað var kanska nakað paniskt í fyrra hálvleiki hjá okkum. Eg kom ofta at standa í ein móti støðum móti Palladino, og hann er altso ótrúliga kvikur.

- Men eftir steðgin fingu vit betri pláss, og so gjørdist tað eitt sindur stuttligari hjá okkum at spæla. Teir seta sjálvandi ferðina nakað niður. Men eg haldi eisini, at vit fáa gjørt neyðugu broytingarnar á miðvøllinum, soleiðis at trýstið á okkum eisini linkaði.

Og so mundi tú eisini enda dystin við at stúta Føroyar upp á 2-3?

- Ja. Eg kom fram til ein skallara har. Men tíverri fór hann á skeivu síðuna av stólpanum.

## Allir gjørdu sítt

**- Eg haldi avgjørt, at vit kunnu vera nøgdir um avrikið. Sjálvandi taptu vit, men vit fingu eitt mál, og talan gjørdist ikki um nakað stórtap, sum summi kanska óttaðust**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk/*
*Álvur Haraldsen*
*jakup@sosialurin.fo*

**Modena, Italia:** Soleiðis segði Jákup Mikkelsen, føroyski liðskiparin, tá hann eftir dystin varð biðin um at gera viðmerkingar til føroyska fjølmiðlaliðið, sum stóð kroyst millum tey á leið 100 italsku tíðindafólkini, sum royndu at fanga viðmerkingar frá sínum stjørnum.

Og ikki minst var liðskiparin nøgdur um arbeiðsavrikið, sum menninir løgdu fyri dagin.

- Tað haldi eg avgjørt. Vit vóru undir einum veldugum trýsti fyri steðgin, men vit arbeiddu alla tíðina sera væl. Og eftir steðgin gjørdist tað so nakað lættari, soleiðis at vit eisini fingu betri frið til at spæla. So alt í alt var hetta ein góður endi upp á undankappingina.



*Jákup Liðskiparin var nøgdur, hóast hann tríggjar ferðir mátti í meskarnar eftir bóltinum*

# Má bara arbeiða víðari

**Eitt sjálvmál er tað, sum kann henda. Og so er bara at arbeiða víðari, heldur Fróði Benjaminsen**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk/*
*Álvur Haraldsen*
*jakup@sosialurin.fo*

**Moena, Italia:** Við einum sjálvmáli eftir 10 minuttum var Fróði Benjaminsen tann, sum fekk gongd á italsku málskjótingina móti Føroyum. At geva toftamanninum skuldina fyri nakað í so máta, er tó helst at gera dekan ov nógv av, tí trýstið á føroyska málið var stórt. Og sjálvur tóktist hann ikki at vera nervaður nakað serligt av hesum.

- Tað er slíkt, sum kann henda, og tú fært ikki vart teg fyri tí. Vit vita jú eisini, hvussu tað kennist, tá tú kemur aftur um tíðliga í dystinum, so tað er bara at reisa seg skjótast gjørligt og koma víðari.

Nógv varð tosað um venjingarstøðuna og serliga vantandi dystarvenjingina hjá føroysku spælarunum undan dystinum. Men Fróði helt tó ikki, at hetta var nakað, sum bilaði stórvegis.

- Vit hava vant alla tíðina, síðani kappingin endaði, og eg haldi, at hetta hevur riggað væl. Vit vistu sjálvandi, at tað kundi gerast meira enn vanliga trupult á útivølli móti heimsmeistarunum. Men vit arbeiddu hart allan dystin, og eg haldi avgjørt, at vit kunnu fara av vøllinum við upprættari pannu. Og eg haldi avgjørt, at har vóru nógvir positivir lutir, sum vit kunnu byggja víðari uppá. Ikki minst við teimum mongu ungu spælarunum á liðnum.



*Við royndunum, sum Fróði eftir hondini hevur savnað sær á landsliðnum, tók tað honum ikki langa tíð at vinna á skelkinum, sum fyrsta italska málið gav*